## Studningur til týðingar

Í hesum døgum verður nýggj avtala gjørd um at týða bókmentir á norðurlendsku málunum. Í nýggjari skipan, har norðurlendskir bókmentamiðdeplar og umboð fyri heimastýrdu londini skulu virka, verður komandi árini studningur til týðingar millum grannamálini viðgjørdur og avgreiddur. Tað er Kulturkontakt Nords Kunst- og Kulturprogram, sum stovnar trý ára stuðulsskipan (2007-2009) við tí endamáli at tryggja útbreiðslu og kunnleika til norðurlendskar bókmentir, skrivar Norðurlandahúsið í tíðindaskrivi. Endamálið við studningsskipanini er at fáa fleiri norðurlendskar dygdarbøkur týddar til onnur mál enn upprunamálið. Við at lata upprunalondunum heimildirnar og umsitingina av studninginum, røkir skipanin endamálið at styrkja og økja útbreiðsluna av týddum norðurlendskum bókmentum. Tað er NORLA, sum er umsitingarstovnur fyri norskar bókmentir uttan fyri Noreg, ið er samskipari í skipanini og netverkinum. Fakliga verður skipanin umsitin av hesum serkønu í einstøku londunum. Í Føroya er tað ein nevnd undir Rithøvundafelagnum.



# Narko-barónur horvin



*Føroya størsti narkobarónur er nú horvin, men løgreglan bæði í Føroyum og í Danmark leitar eftir honum, tí hann hevur framvegis ikki avgreitt alla revsingina. Her er hann á veg úr rættinum í størsta rúsevnamáli í Føroyum nakrantíð, har løgreglan avdúkaði eitt heilt kervi av smugglarum, seljarum og keyparum*

**Hann er dømdur fyri umfatandi sølu av rúsevnum í Føroyum, men nú finna hvørki løgreglan í Føroyum ella í Danmark mannin og sostatt er hann higartil sloppin undan einum stórum parti av revsingini**

NARKOKOMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Høvuðsmaðurin í Føroya størsta narkotikamáli, er horvin.

Seinastu tíðina hevur løgreglan bæði í Føroyum og í Danmark leitað eftir manninum, men alt til fánýtis.

Og tað elvir nú til trupulleikar, tí umframt langa fongsulsrevsing, varð maðurin eisini dømdur at rinda fleiri hundraðtúsund krónur.

Men nú maðurin er horvin, ber heldur ikki til at fáa fatur á pengunum.

Maðurin varð nevndur sum høvuðsmaður í stóra rúsevnamálinum, sum var í Føroyum í 2002.

Umframt drúgva fongsulsrevsing, varð hann eisini dømdur at betala 550.000 krónur, men tær hevur løgreglan onki sæð til enn.

Vanliga er fyrningarfreistin fimm ár, so fyri at sleppa undan at kravið móti manninum skal fyrnast og sostatt detta burtur, er málið aftur nú lagt fyri rættin.

Og bú hevur rætturin so avgjørt, at fyrningarfreistin verður longd, til maðurin er funnin.

Men tað kann vísa seg at vera torført.

Seinastu tíðina hevur løgreglan í Føroyum og í Danmark leitað eftir manninum, men hann er farin undir jørð og er sostatt heldur ikki at finna.

Talan er um ein dana, sum hevur búð í Føroyum í mong ár.

Men hann hevur ongan skrásettan bústað, hvørki í Føroyum ella í Danmark og tí kann hann verða torførur at finna.

Men nú skal so løgreglan so leita meiri gjølla eftir honum, tí ætlanin er ikki at sleppa málinum.

### Høvuðsmaðurin

Narkomálið, sum hann varð høvuðsmaður í, vardi tað mesta av 2002 og tað endaði við, at hann var dømdur at sita í trý ár og at betala 550.000 krónur, sum varð mett at vera tann inntøka, hann hevur havt av søluni í Føroyum.

Harafturat skuldi hann betala sakarmálskostnaðin, sum varð ásettur til 140.000 krónur.

Men løgreglan hevði onga hóming av, hvar pengurin var goymdur og enn hava tey so heldur ongan pening sæð.

Hetta var tað mest umfatandi rúsevnamálið í Føroyum nakrantíð og í hesum samband vóru húsarannsóknir bæði í Føroyum og í Danmark og ein rúgva av fólki vórðu handtikin og ákærd í málinum, har løgreglan avdúkaði eitt heilt kervi av seljarum, smugglarum og keyparum í Føroyum.

Úrslitið var ein røð av dómum, men høvuðsmaðurin fekk so nógv tann harðasta dómin.

Talan var bæði um hassj, amfetamin og kokain og eitt vitni í málinum kallaði hann tann "leiðandi rúsevnaseljaran í Føroyum" og rætturin var samdur í, at tað í stóran hann, sum skipaði fyri at smuggla og selja rúsevni í Føroyum ígjøgnum langa tíð.

Tá ið málið var fyri, helt ákæruvaldið fast við, at hann hevðu forvunnið 1,3 millión uppá rúsevnasølu, men óvissa er um nøgdir og prísir og tí varð avgjørt, at hald skuldi leggjast á 550.000 krónur.

# Føroyingar við krabbameini fáa orðið

**Nú skal ein umfatandi kanning vísa, hvussu tað er at liva við krabbameini**

KANNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú fer Føroya felag ímóti krabbameini undir eina umfatandi kanning sum skal lýsa, hvussu tað er at liva við krabbamein.

Felagið staðfestir at fleiri og fleiri fáa krabbamein, og í flestu førum hevur tað stórar avleiðingar við sær, eisini hjá teimum, eru søgd at vera frísk.

Og ætlanin við hesi kanningini er at lata tey, sum eru rakt av krabbameini, sjálvi sleppa til orðanna at greiða frá, hvussu tey hava tað.

Kanningin er gjørd við spurnarbløðum, har sjúklingurin skal greiða frá, hvussu hann er fyri likamliga, sálarliga og sosialt, tað vil siga, hvussu familjuviðurskifti, vinir og tilknýti til onnur, eru.

Spurt verður eisini um, hvussu sjúklingurin er fyri, tá ið hann má í annað land í viðgerð og má samskifta á øðrum máli enn móðurmálinum.

Og at enda verður spurt, hvussu sjúklingurin er fyri, tá ið tað ræður um inntøku, fíggjarviðurskifti sum heild, bústað, arbeiði, trygging og annað í sama viðfangi.

Føroya Felag ímóti krabbameini sigur, at jú fleiri, ið svara, jú betur verða trupulleikarnir lýstir og tí heitir felagið á øll áhugað, um at seta seg í samband við felagið og fáa meiri kunning um kanningina.

Fleiri hava longu svara spurnarblaðnum og fleiri av teimum fáa møguleika at útgreina nakrar av spurningunum munnliga, tí nú byrjar næsta stigið í kanningini, har sjúklingar og næstu avvarðandi verða biðin at greiða frá teirra royndum.

- Tað er góð orsøk at lata tey sjúkuraktu sjálvi greiða frá síni støðu og lata tey svara spurninginum, tí kanska kunnu sjúklingar og teirra avvarðandi eisini læra fakfólk eitthvørt í hesum sambandi.

Annars fæst meiri at vita um kanningina á www.krabbamein.fo og á www.rehab.fo.